


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Suðurleiðin – ein neyðug íløga fyri Føroya land



Val
JACOB VESTERGAARD
Fólkaflokkurin

Føroya Løgting hevur nú endaliga samtykt at farast skal undir Sandoyartunnilin. Hetta er byrjanin til Suðurleiðina, sum við føstum sambandi skal binda Sandoyna, og síðan Suðuroynna, saman við restina av landinum.

Hesi samtykt stuðli eg av fullum huga.

**Infrakervi**

Vit eiga eitt lítið oyggjaland. Skulu vit mennast og standa okkum í kappingini við onnur lond, er ein tann týdningarmesta fyritreytin eitt gott infrakervi. Tí bert við einum góðum infrakervi skapa vit trivna og góðar virkismøguleikar í øllum landinum, og fyrst tá ber til at gagnnýta alt okkara tilfeingi á fullgóðan hátt.

Tá fasta sambandi vid Sandoynna og Suðuroynna er veruleiki, kunna hesar báðar oyggjar luttaka í menningini av Føroyum á jøvnum føti við restina av landinum, og geva eitt størri íkast til landsbúskapin.

Tí eigur eitt komandi løgting at standa fast við og saman um Sandoyartunnilin.

**Hørð og bleyt virði**

Tey, ið eru ímóti tunnilinum til Sandoynna halda uppá, at vit hava ikki ráð til hesa íløgu. Sagt verður, at føroyskir politikkarar nýta ov nógvan pening til sonevnd hørð virðir, sum vegir og tunnlar, meðan ov lítið verdur nýtt til sonevnd bleyt virðir, sum skúla- og heilsuverk.

Hesum eri eg ikki samdur í.

Samlaða fíggjarlógin er uml. 4 milliardir. Helmingurin, uml. 2 milliardir fara til almanna- og heilsumál, meðan uml. 1 milliard fer til skúla- og mentamál.

Restin, uml. 1 milliard, er býtt millum hinar ráðharrastovurnar,

Løgmansskrivstovuna, Fiskimálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Vinnumálaráðið og Innlendismálaráðið.

Tað, sum árliga verður nýtt til íløgur í vegir og tunnlar er at finna innanfyri hesa milliardina, og er tað ein lutfallsliga lítil partur av árligu fíggjarætlanini.

Tað er tí ikki rætt, tá sagt verður, at alt okkara ríkidømi verður brúkt til at borða tunnlar við.

At gera Sandoyartunnilin til eitt val ímillum tey sonevndu hørðu og bleytu virdini, haldi eg eisini verða at seta tingini skeivt upp. Tí íløgur í hørð virðir, sum fast samband millum oyggjarnar eru ikki einans til fyrimuns fyri vinnulívið og gerandisdagin hjá borgarunum. Tær skapa eisini røttur fyritreytirnar fyri skilabetri íløgur í bleytu virðini, sum skúla- og heilsuverkið.

Størri fólkagrundarlagið er, betur og bíligari kann landið skipa sínar tænastur til borgaran.

Og tá vit øll, uttan mun til hvar vit búgva, kunnu náa teimum tilboðum, sum eru, um tey so eru sunnanfyri ella norðanfyri, fáa vit fjølbroyttari og betur tilboð á øllum økjum.

**Fyrst nýta skipini, so tunnil**

Tað eru eisini nøkur, ið siga, at íløgurnar í Smyril, Teistan og havnaløg hava verið so stórar, at suðuroyingar og sandoyingar fyrst mugu "slíta" hesar íløgur upp, áðrenn talan kann verða um at nýta pening til tunnlar.

Hetta haldi eg vera alt annað enn samhaldsfast og sera stuttsiktað tankagongd.

Jú, Smyril og Teistin eru góð skip, og Sandoyggin og Suðuroyggin eru enn virknir partar av føroyska samfelagnum. Td. veitir Suduroyggin enn eitt lutfallsliga stórt íkast til landshúsarhaldið við teimum stóru veiðinøgdunum, ið verða lagdar upp í Suðuroynni.

Men tað er ein sannroynd, at Suðurføroyar hava verið í eini neiligari gongd seinastu mongu árini.

Í løtuni er fólkatalið í Suðuroynni á sama støði sum í 1920unum, og aldursbýtið gerst skeivari fyri hvørt ár.

Tí mugu politikkarar vísa vilja og rygg til at gera tey tiltøk, sum skulu til fyri at venda gongdin nú, meðan støðan enn er hampulig, og ungir suðuroyingar við útbúgving enn síggja møguleikar í at búseta seg í Suðuroynni.

At seta seg niður og bíða í 20 til 30 ár til skipini er uppslitin, er ikki rætta signalið at senda sandoyingum og suðuroyingum, og harafturat ótrúðliga lítið visionert av fólki, sum nú við einum valdømi siga seg vilja stjórna øllum landinum meira enn nakrantíð.

Ein onnur skilagóð grundgeving fyri at fara undir Suðurleiðina so skjótt sum gjørligt, er kostnaðurin av verandi farleiðum til Sands og Suðuroyar.

Við verandi kostnaðarstøði verður rakstrarkostnaðurin av sjóvegis farleiðini uml. 60 - 70 milliónir í 2008. Væntast kann, at í framtíðini verða størri krøv sett til tænastustøði og túratal, umframt at hækkandi oljukostnaður og lønir fara at økja útreiðslurnar enn meira.

Við hesum útreiðslum í huga, og kostnaðinum av at byggja nýggjan Teista og Smyril innanfyri næsti áratíggjur, sigur tað seg sjálv, at skilagott er at fara undir fyrireikingar til Suðurleiðina beinanvegin.

**Niðurstøða**

Vit hava higartil megnað at útbygt okkara land við vegum, tunnlum og ferjum, samstundis sum vit hava ment almanna-, heilsu- og skúlaverkið.

Lat okkum ikki steðga útbyggingini av infrakervinum nú, við vanda fyri at Suðurføroyar bløða út, bert tí at eitt innanhýsis klandurstríð í Javnaðarflokkinum, um hvørt studentaskúlin í Hoydølum skal leggjast saman við Handilsskúlanum, hevur seinkað ætlanini í áravís, og tí Dimmalætting uppundir val leggur dent á at skriva ræðusøgur um okkara sjúkrahúsverk.

Vit eiga góð fólk í bæði skúlaverkið og heilsuverkið. Tað ber væl til styrkja og skipa hesi verk betur, samstundis sum hildið verður fast við ætlanina at gera Sandoynna og Suðuroynna til javnsbjóðis partar av føroyska samfelagnum.

Tá tey, sum eru búsitandi í Tórshavn eins væl kunnu virka í Sandoynni ella Suðuroynni, sum á Hálsi ella á Hjalla, og tey sum búgva í Suðuroynni kunnu virka í Vágum ella Norðoyggjum, sleppa vit undan teirri staðbundnu hugsanini, og vit fara at skipa vinnuna og tænastutilboðini í landinum meira rationelt, og fáa yvirskot til enn fleiri íløgur av bæði "bleyta" og "harða" slagnum.

Lat okkum tí standa saman um at fremja løgtingssamtyktina um Sandoyartunnilin í verki, og fara undir fyrireikingar til víðari fasta sambandi til Suðuroyar, so Suðurleiðin kann verða veruleiki so skjótt sum til ber, til gagns fyri alt Føroya land.

---

# Táið ongin statur er at umboða



Val
TÓRBJØRN JACOBSEN
Tjóðveldi

Tveir føroyskir ungdómar standa og javnviga á eini politiskt skaptari knívsegg. Tveir úrmælingar í svimjing, sum fyri ítrótt teirra eru so óhepnir, at teir eru bornir í heim og uppvaksnir í einum av alra seinastu hjálondum heimsins. Tey bæði Elspa og Pál sleppa ikki upp í altjóðagerðina, tí politikkararnir í landi teirra megna ikki at skipa ein stat kring sína egnu tjóð. Koloniala støðan er harvið ein beinleiðis forðan fyri menning, eisini á hesum øki. Danskt vald í Føroyum er ein beinleiðis forðing fyri at ítróttarelitan sleppur at kappast á jøvnum føti við sínar javnaldrar í øðrum londum.

Umframt megina, ið skal brúkast til venjing hvønn dag í árinum, verða tveir viðkvæmir ungdómar trýstir til at taka tvær sera ódámligar støður, sum teir onga ávirkan hava á, tey bæði hava ikki so frægt sum valrætt. Má siga, at tað vætti úr eygnakrókunum hetta kvøldið, táið Pál í sjónvarpinum boðaði frá, at hann ikki ætlaði sær at umboða nakað annað land enn Føroyar á hægsta støði, og bar tað ikki til, varð hann noyddur at velja at luttaka í kappingum, sum lógu í eini lægri kategori enn t.d. Olympisku Leikirnir. Sum hann sjálvur segði: Eg eri uppvaksin í einum umhvørvi, sum ger tað ómøguligt. Ein ungur maður, har emotionalitetturin og stoltleikin um egnan samleika steðgar honum á leiðini upp á heimsins tindar. Hann koppar tann vegin, ikki tí hann vil tað ítróttarliga, men tí at politikkararnir í landi hansara ikki hava skapt honum møguleikarnar.

Elspa koppar hinvegin. Ítróttarligu ambitiónirnar vinna. Hon ætlar sær upp á heimsins tindar, so má okkurt annað, sum er minst líka týdningarmikið, víkja fyri hesum. Nú kenni eg av góðum grundum umhvørvi, sum hon er uppvaksin í. Úti í Grógv í Sýðrugøtu, har eg sjálvur búleikaðist øll míni barnaár. Abbi hennara var mammubeiggi mín, og eitt meira tjóðskaparligt miljø enn tað har um leiðir, verður trupult at finna. Harvið standa tey bæði Pál á somu knívsegg, og velja at fara hvørt sína kós. Ikki tí at tey vilja tað, men bara tí at fyritreytirnar ikki eru vorðnar optimalar, soleiðis, at tað ber til at umboða Føroyar í øllum fora, orsakað av politiskari vanstýring og krúpan fyri donskum myndugleikum og harravaldi. Tey sleppa ikki upp um politiska bjálkan, sum danir hava sett ígjøgnum føroysku tjóðina og sum ein meiriluta í politisku skipanini ikki enn hevur megnað at høgt niður.

Serliga hesi seinastu árini hava vit upplivað eina heimastýrisstjórn, sum oftari og oftari hevur avdúkað, at støðan er vónleys, at tað ikki ber til at gerast ein partur av heiminum, at gerast ein partur av týdningarmiklum og lívsneyðugum felagsskapum, har sum bara statir kunnu gerast limir og virka, ímeðan fólki í koloniunum sleppur at spæla fólk í húsi innanvert tey mørk í ostaklokkuni, sum hjálandaveldið nú einaferð setur.

Fyri nøkrum árum síðani var forseti ÍSF´s rættiliga optimistiskur um ein komandi limaskap í Olympiska felagsskapinum IOC. Javnaðarmaðurin, Heðin Mortensen, er meira svartskygdur nú, sambært Sosialinum. Sum hann sigur: Tað verður hvørki í dag ella ímorgin, at Føroyar fáa olympiskan limaskap. Hann sigur eisini, at í útgangsstøðinum eru treytirnar hjá IOC, at tú skalt vera sjálvstøðugur limur í ST. Harvið er uppgávan sera einfald at loysa. Og vit loysa so ómetaliga nógvar aðrar trupulleikar í hesum landinum, um vit sleppa okkum av við einastu forðingina fyri allari altjóðagerð, sum er hjálandastøðan í danska ríkinum.

Skal heimurin liggja opin fyri okkum, má og skal føroyski staturin skipast nú. Táið hesin er vorðin javnsettur limur í ST, er politiski doyvingarheilivágurin burtur, og ungir føroyingar í m.a. ítróttarkappingum kunnu tá møta sínum javnaldrum við egnum samleika, undir Merkinum, við Olymisku Leikirnar. Ymisku og tó ógvuliga líku trupulleikarnair hjá teimum báðum svimjarunum høvdu verið loystir við einum handabragdi. Hetta snýr seg bara um, at politiski myndugleikin í Føroyum brynjar seg við sama vilja og áræði, sum tey bæði Pál og Elspa eru so ríkiliga vælsignaði við.

Ein republikk, og bara hon, loysir allar knútar á leiðini til optimalar og javnsettar møguleikar.

www.dimma.fo/Bloggan/torbjorn.jacobsen/